## DAGSINS MEINING

# Ongantíð aftur!

Sunnudagin var hátíðarhald víða hvar í Eysturevropa til minnis um fall nazismunar. Í hesum sambandi hevur Rusland nýtt høvið at minna heimin á, at gamla Sovjet eftir russiska forsetans áskoðan meira enn nakað av hinum stórveldunum bar byrðarnar av stríðnum móti nazismuni. Hetta er ikki fallið í góða jørð hjá øllum fyri vestan, og hevur eitt nú danski forsætisráðharrin kravt, at Rusland vegna Sovjetsamveldið skal geva eitt nú baltisku londunum eina umbering fyri ringa viðferð undir og eftir annan heimsbardaga. Russum hevur dámað illa hesa uppílegging hjá danska forsætismálaráðharranum, men teir eru tó ikki meira firtnir enn so, at danski forsætisráðharrin er gestur hjá russiksu stjórnini saman við fleiri av heimsins leiðarum, ið hátíðarhalda, at annar heimsbardagi endaði formliga sunnudagin fyri seksti árum síðani.

Heima í Danmark hevur forsætisráðharrin vakt ans við at geva skyldfólkunum hjá teimum jødum, sum danska stjórnin sjálvboðin útflýggjaði Nazitýsklandi undir hersetingini av Danmark. Danir taka yvirhøvur sera væl ímóti hesi hending og rósa forsætisráðharranum fyri hetta. Men samstundis undrast fólk á, at landsins hægsti embætismaður ikki samstundis gevur donsku kommunistunum eina tilsvarandi umbering. Danskir kommunistar, ja, sjálvt fólkatingsmenn, vórðu handtiknar av danskari løgreglu og latnir Gestapo, sum sendi teir til KZ legur, haðan fleiri ikki vendu aftur. Tað hevði sømt seg fyri forsætisráðharran at givið hesum landsmonnum eina umbering fyri hesa ræðuligu brotsgerð.

Nú eru so liðin seksti ár síðan heimsbardagin endaði í Europa. Talan er um eitt hitt ræðuligasta skeið í søgu mannaættarinar. Bardagin kostaði eini 50 milliónir mannalív, hvarav tær 27 milliónirnar vóru russar og tær seks milliónirnar vóru jødar, týndir í KZ legum av nazibølmennum. Nazisman varð bard niður, tí stórveldini Bretland, Frakland, Sovjet og USA kundu semjast um, at henda rørsla var ein so stór hóttan móti mannættini, at hesi stórveldi, ið annars sínamillum vóru sera ósamd, noyddust at ganga saman um at basa hesi mannavondu rørslu. Við stríðslok samdust tey sameindu um at stovna ST til tess at forða fyri, at nazisman nakrantíð aftur fekk høvdið fyri seg og fyri at tryggja varandi frið í heiminum. Tað hevur eydnast at basa nazismuni, hóast hon setir høvdið fram víða hvar. Verri er við rasismuni, sum tykist kykna upp víða hvar í Europa. Nazismunar brotsverk mugu ongantíð aftur verða endurtikin. Hvørki nazisma ella rasisma kunnu góðtakast og eiga øll rætthugsandi menniskju støðugt at vera á varðhaldi. Hetta er ein læran av tí 60 ára minni, sum verður hildið í hesum døgum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hans Pauli Strøm fer frá barrukadunum til koyrilin



**Annita á Fríðriksmørk**
*tingkvinna fyri Tjóðveldisflokkin*

Hans Pauli Strøm kann brúkast til mangt!

Nú er hann initiativtakarin til at forða fakfelagsrørsluni at fara í verkfall. Fútabann var hansara fyrsta reaktión, tá ið sjúkrarøktarfrøðingarnir ætlaðu at nýta sítt einasta amboð, sum tær hava, nú leiðslan á landssjúkrahúsinum við blástempli frá HPS hevur degraderað teirra virkisøki.

Hóast eg havi framúr góðar royndir av fakfólkunum á føðideildini, bæði jarðamøðrum og sjúkrarøktarfrøðingum, fari eg ikki at gera meg klóka uppá, hvør í best er egnað til at leiða føðideildina.

Men eg skylji ikki, hví slík provokerandi tiltøk skulu setast í verk mitt í einum sáttmálaskeiði.

Eitt og hvørt fakfelag vildi reagerað júst soleiðis sum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar hevur reagerað. Gjørdi felagið ikki tað, so vardi tað ikki rættin og áhugamálini hjá limunum.

Seinast fútabann var sett í gildi, var eftir at Brimil hevði ligið liðugur í Noregi í fleiri mánaðir og bíða eftir eini semju, so hann kundi fara í sigling, og eftir at bann varð sett móti manningini hjá Tjaldrinum at fara umborð.

Men hesuferð bíðar HPS ikki so mikið sum éin dag. Sjúkrarøktarfrøðingarnir skulu sláast á fingrarnar beinanvegin. Hóast felagið hevði tryggjað sær, at alt virksemi, sum var lívneyðugt var undantikið verkfallinum Men HPS vísir ikki fagfeløgunum og teirra virksemi náði yvirhøvur.

Hesin sami maður sum í andstøðu í 2003 gjørdi seg til sjálva ímyndina av fakfelagsrætti, tá ið hann sum hin stóri gekk úti á barrukadunum ímillum arbeiðarafjøldina. Men hendan fyrr so ýdna fakfelagskempan, klárar nú betri enn nakar fólkafloksmaður nakrantíð hevur klárað at steðgað fakfeløgunum.

Tá ið HPS bókstaviliga gekk undir liðini á teimum, og tá ið Javnaðarflokkurin sat í andstøðu kravdu arbeiðarafeløgini 60 % lønarhækkan. Nú Javnaðarflokkurin er í samgongu taka tey til takka við 0% lønarhækkan - í krónum og oyrum. T.v.s., at um vit taka prísvøksturin við, sum alt bendir á eisini kemur at merkja tað komandi árið, so merkir hendan semjan í veruleikanum eina lønarlækking fyri arbeiðarafjøldina.

Samstundis sum gjógvin er vaksin millum hág og láglønt við samtykta skattalættanum, sum øll samgongan atkvøddi ígjøgnum.

Men hóast hesa 0% lønarhækking frá fakfelagsrørsluni og hóast Javnaðarflokkurin hevur tikið stig til skattalættan til tey hægstløntu, himprast HPS ikki við at brúka koyrilin mótvegis einum øðrum parti. Ongin skal ivast í hvør ræður í hesum landi, tey sum ikki akta harraboð við leiðsluordrum skulu gera tað við fútabanni.

Beinanvegin!

# Viðmerking til staðfesting av endaligu Heimastýrislógini!



**Bergur Wardum**

Heiti kann vera nógv, og í hesum sambandi er heiti Yvirtøku- og Heimildarlóg, og setir tað nógvar spurningar við, hvat Danska Stjórnin vil við hesum lógum!

Í stuttum kann sigast, at hesar lógir eru úrslit av Sjálvstýristilgongdini, sum í stuttum kann sigast, hevur skatt trúvirði hjá Danska Statinum, tí í veruleikanum er Danski Staturin einki annað enn eitt hjálandaveldi, hvørt vit vilja vera við tað ella ikki, og heimastýrislógin er í dag ein útbrendur akademiskur dulbúnaður / »camouflage«, sum hevur virkað fram til nevndu tilgongd, og Løgmaður okkara fór út í heim at gera millumtjóðaavtalur!

Tann mannagongd, sum hevur verið nýtt, hevur avdúkað okkara hjálandastøðu, og vil heimildarlógin, saman við teimum Donsku viðmerkingum fyribyrgja hesum, tí er tað altumráðandi, at Grundlógin verður nevnd í viðmerkingunum. Restin er virðisleyst í samband við okkara Statsrættarligu støðu, sum vit fingu staðfest í tí einasta fordømi, har bæði Danskar og Føroyskar viðmerkingar vóru, og var tað heimastýrislógin. Ríkisumboðskvinnan, Birgit Klejst, hevur staðfest fyri Løgtinginum, at føroysku viðmerkingarnar ongan sum helst týdning hava fyri danir!

Tað er umsitingin, ið eigur at tryggja at lógaruppskotini eru politiskt borðbær, tað vil siga, at lógaruppskotini løgfrøðiliga hanga saman áðrenn tey koma fyri Tingið. Tað er Løgtingsskrivstovan, ið eigur at tryggja hetta. Men tað er ikki hent í hesum týdningarmiklu málum, tí vit hava sum kunnugt, bæði Danskar og Føroyskar viðmerkingar, sum ger, at málið er sera óruddiligt. Herumframt kemur, at í álitinum til málið átti at verið ein niðurstøða frá Altjóðaserfrøðingum í Stjórnmálafrøði. Tá hesin parturin var komin uppá pláss, so áttu vit at tryggja okkum lyfti frá Donsku Stjórnini um, at hesar lógir vórðu lagdar fyri ST og aðrar altjóðastovnar- og felagsskapir, áðrenn tær vórðu samtyktar!

Eftirtíðin vil ikki einans døma politikararnar fyri at teir soleiðis hava givið fatan av, at teir vóru óvitandi um tað, teir samtyktu, men eisini fyri at hava givið fatan av, at teir ikki vistu hvat teir samtyktu. Men sanniliga eiga politikararnir eisini at verða dømdir og eftirmettir fyri, at hava vilja fjalt seg aftan fyri virðisleysum viðmerkingum, sum einans eru tilætlaðar at rættvísgera seg sjálvar tá aftur er brúk fyri stuðli frá veljarunum, sum teir soleiðis hava niðurgjørt.

Hesar viðmerkingar skulu enda við titlinum á einari kendari skaldsøgu:

»Grát, grát mítt kæra land.«

Hvat hevur mítt kæra land gjørt, síðani tað hevur uppiborið slíkan politikk!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.